# handVERKARIN

BLAÐ NR. 51

HAVNAR HANDVERKARAFELAG




# SVEINASTYKKIÐ HJÁ NIELS CHRISTOFFER DEBES

### Umbygging av ogn felagsins í Stoffalág



Sum samtykt á aðalfundi varð útbjóðingartilfar sent út til nakrar fyritøkur. Tað var Húsavarðatænastan, sum fekk arbeiðið, og eru teir farnir undir at gera arbeiðið.

Tað hevur verið ein trupulleiki, at hitaútreiðslurnar hava verið sera stórar. Hetta kemst m.a. av vánaligari isolering, gjóstri, kuldabrúgv og vánaligum vindeygum.

Serkunnleikin hevur mælt okkum til at bjálva og klæða húsið, og at skifta vindeygu og hurðar. Samstundis verður altanin innilokað.

Miðhæddin verður dagførd, og í kjallarahæddini verða broytingar gjørdar. Ætlanin her er at taka øki undir altanini uppí verandi kjallarahøli, eins og ventilatión verður gjørd. Ætlanin er eisini at gera eitt handikapp vesi í gongini.

Henda umbygging kostar sjálvandi nakað, men vit koma eisini at spara oljuútreiðslur. Harumframt verður húsið fult uppdaterað og harvið virðisøkt.

Tá ið arbeiðið er liðugt hava vit eitt nýmótans felagshús, sum lýkur øll krøv fleiri ár fram. Og vit hava eitt hús, sum vit kunnu vera errin av.

Sum vit síggja á myndini er arbeiðið komið langt væl áleiðis.

**Í blaðnum hesa ferð:** síða


Oddagrein . . . . . . . . . . s. 2
Sjónarhornið: Torkil Sørensen . . . . . . . . . . s. 3
Sveinastykkið hjá Niels Christoffer Debes . . . . . . . . . . s. 10
Elias Johansen: Sleipistøð og byggihøll í Álakersvík. . . . . . . . . . . s. 14
Hans B. Arge og bátamotorurin „Royndin“ . . . . . . . . . . s. 24



Útgevari: Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
Ábyrgdarblaðstjóri: Eli Brimsvík
Blaðstjórn: Media · Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Skrivstovutíð: Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverkarin@handverk.fo · www.handverk.fo






**Havnarmaður:**
Eg eri uppvaksin við Hoyvíkstjørn, sum tað nevndist, tá eg var smádrongur, nú eitur tað Kommansmýra. Har var okkara spæliplláss, nú lagt undir asfalt, og ein heilur býarpartur komin í staðin. Hoyvíkstjørn er tí betur ikki farin undir heilt, tó at hon er nakað broytt, har eru stórir steinar lagdir út í tjørnina; onkur sigur at tað skal fyri stilla eitt føroyakort. Eg dugi ikki rættiliga at síggja tað, men okkurt skal tað helst merkja. Hoyvíkstjørn gevur nógv góð og hugnalig minnir: har sigldu vit við flakum, sum høvdu nógv ymisk snið. Summir gjørdir úr viði, aðrir úr takplátum; teir mest brúktu vóru helst tunnuflakarnir, sum helst eisini vóru teir mest stabilu. Mangur karmur man vera komin frá flakatíðini á Hoyvíkstjørn. Um veturin, tá kavi lá og tjørnini og hon var fryst, tá var stuttligt at eiga ísskoytir; tær blivu nógv brúktar. Serliga hugnaligt var um kvøldarnar, tá teir komu av Marinustøðini og settu ljós upp, so vit sóu at skreiða. Tað kom eisini fyri, at vit fingu sodavatn og sjokulátu frá teimum, forkunnugt tá í tíðini. Við Hoyvíkstjørn var hugaligt at vaksa upp.

**Unnusta:**
Marjun Justunussen.

**Børn:**
Katrin 32 ár og Alice 28 ár

**Útbúgving byrjað:**
Byrjaði at læra til elektrikkara í 1977

**Lærumeistari:**
P/F Einar Mikkelsen
Útbúgvingin lokin:
1981

**Maskinútbúgving:**
Fór á maskinmeistaraskúla í 1984 og tók maskinistprógv í januar 1985.

**Størv:**
Eftir lokna lærutíð helt eg fram, eitt stutt tíðarskeið, at arbeiða hjá Einar Mikkelsen. Flutti síðan suður á Tvøroyri at búgva, og arbeiddi har hjá Poul Eli Bærensen til eg í 1984 fór á maskinskúla.

# SJÓNARHORNIÐ: TORKIL SØRENSEN



**Til skips:**
Eftir lokið maskinistprógv fór eg til skips; fyrst eitt stutt skifti sum maskin-assistentur við tí - tá sera framkomna roro-skipinum Líðartindur, sum kláraði at vera í Føroyum eina ferð um vikuna, har onnur reiðarí brúktu tvey skip, sum vóru í Føroyum aðru hvørja viku. Á sumri 1985 mynstraði eg sum annar meistari við djúpvatnstrolaranum Suðringi, og var við honum til januar 1987. Eg slapp ongantíð av við sjóverkið, so best var at sleppa sær upp á turt og hava fast undir fótum aftur. Í februar sama ár fór eg at arbeiða sum elektrikkari á Vágs Skipa-smiðju, og bleiv tað eitt sera spennandi og gevandi arbeiði har vit gjørdu elarbeiði, frá A til Z, umborð á fleiri nýbygn-ingum, línubátarnir Vársól og Miðvingur og trolarin Sverri Ólason. Tí verri mátti Vágs Skipasmiðja gevast við virkseminum, vit vóru jú seint í 1980-unum. Spell, tí har arbeiddu langt omanfyri 100 dugnalig fólk. Har fingu fleiri eina óvissa framtíð, sjálvur hevði eg ymiskt fyrifallandi arbeiði, til eg í 1991 flutti aftur til Havnar. Tá var eg heppin at fáa arbeiði á Tórshavnar Skipasmiðju, eitt sera gott arbeiðspláss, har eg kom at hava ábyrgd av elgoymsluni. Har arbeiddi eg í 13 ár, tá eg fekk møguleikan og tók av at arbeiða sum elektrikari við gøtuljósum hjá Tórshavnar Kommunu; har havi eg nú arbeitt tey seinastu 10 árini.

**Hvørjar el-perur brúkar kommunan til gøtuljós:**
Tað eru fleiri ymisk sløg av perum, sum vera brúktar. Vanligar gløðitráðsperur eru næstan ikki til at skaffa longur, hesar brúka vit ikki vanliga men á Jólum og á Ólavsøku hava vit brúkt tær nógv í teim ymsu seriunum sum hanga oman eftir Áarvegnum og nú í Tórsgøtu og yvir á Skálatrø. Til tað eru royndar nýggjar ledperur við sama sniði sum vanligar perur hava, úrslitið er misjavnt.

Annars brúka vit enn nógv natriumperur, tað eru perur sum hava Gulan lit, styrkin liggur frá 70w til 150w, eisini brúka vit kviksylv-urperur, tær hava hvítan lit og hava eina styrki frá 80w til150w

Nakað av rørperum (spari-perum) brúka vit eisini, tær eru munandi minni í styrki, men geva munandi meira ljós. Vit hava t.d. eina spariperu, sum vit brúka nógv, hon eitur 23w, men svarar til eina vanliga gløiperu, sum er 125w - tað kann ein kalla eina spari-peru.Framtíðarljósið er helst led ljós, og tað eru ein ørgrynna av ymsum ljósum at fáa. Eg eri ikki rætti persónur at siga, hvat led ljós ein skal brúka, men fleiri sløg eru, sum eru rættiliga góð. Tórshavnar Komuna ger fleiri royndir fyri at vita hvør loysn er tann besta, Strandarvegurin er brúktur sum royndarøki, og fer tú ein túr yvir við strond, so sær tú nógv ymisk ljós; summi eru góð og onnur minni góð. Styrkin á hesum ledljósum er frá 32w til 59w, so tey flestu geva nógv ljós fyri fá watt.

**Hvat heldur tú um eftirlønina hjá Havnar Handverkarafelag:**
Hon er góð.

**Hvat heldur tú um lívstryggingina hjá felagnum:**
Tað er gott at hava eina lívstrygging, kenni onkran, sum hevur fingið brúk fyri hesi trygging í samband við álvarsama sjúku.

**Hvat er største avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:**
Alt arbeiði er ein avbjóðing, annars, at arbeiðið er væl úr hondum greitt, so vit kunnu vísa, at vit eru kappingarfør.

**Hvat gleðir teg í gerandisdegnum:**
Tá ein merkir framgongd og, at ein er frískur og klárar at útføra eina uppgávu uttan trupulleikar.

**Hvussu eitur besti handverkarin, sum tú veit um:**
Haldi ikki nakar kann kallast besti, øll munnu nokk hava okkurt tey eru best til.

**Hvat kann øsa teg:**
At síggja hasar økoterroristarnar standa á nærum hvørjum p-plássi og kika út á sjógv, heldur enn at fara heim at fáa sær eitt arbeiði.

**Frítíðarítriv:**
Seyður, hagalív og at fjasast við garð og hús

**Besta bók:**
Álmanakkin

**Besti tónleikabólkur:**
Toto

**Besti sangari:**
Bobby Kimble og David Byron

**Besti sangur:**
July morning hjá Uria Heep

**Besti filmur:**
Kellys helte

**Besti handverkari:**
Janus Sørensen

**Hvør heldur tú hevur mynda tín persón mest:**
Fleiri, nevni ongan

**Søguligur persónur, sum hugtekur teg**
Pytaguras

**Telefon:**
Nokia

**Telda:**
Samsung

**Bilur:**
Hyundai  Gets


Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo
DEWALT
BYGMA
BALSLEV
...til handverkaran


sansir.fo
Heildarloysnir
frá Articon
Eitt trygt grundarlag
Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkara-arbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo


2x3
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN
AMBOÐ ARBEIÐSKLÆÐIR
TILFAR BESLØG MASKINUR
Júst tá tú stendur
og manglar tað
2x3 & Timburhandilin Tórshavn: 31 12 50 Kambsdalur: 44 44 41


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum
skatti
Afturrindan
av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir
grannskoðarar


Glarmeistarin v/Poul Guttesen.
Søla og montering av
lágorkutermorútum,
u-virði niður í 0,4.
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo
Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466


elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl


SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR
www.tst.fo
skapandi umhvørvi
Tekniski Skúlin
.... ein virkin og góður samstarvsfelagi
Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum
samstarvi við vinnu og lærling
• vit seta lærlingin í miðdepilin
• vit nøkta tørvin hjá vinnuni
• vit hava høgan námsfrøðiligan
og fakligan førleika
Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stíl@Snið
Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Limousine
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700

# SVEINASTYKKIÐ HJÁ NIELS CHRISTOFFER DEBES



*Sveinastykkið hjá NIels Debes, sum vit síggja høgrumegin varð nevnt „sykomode“. Í komoduni eru 8 smáar skuffur og ein størri. Í miðjuni er eitt skáp við prýddari hurð. Sveinastykkið má sigast at vera satt listaverk. Fyri sveinastykkið fekk Niels bronsumedalju, sum er dagfest 29. apríl 1948.*

Tá ið Niels Debes fór í snikkaralæru í 1936 vóru lærlingaviðurskiftini ikki skipaði, sum tey eru í dag.

Niels fór í læru hjá Hartvig Hansen, ið hevði snikkaravirkið í Havn. Eitt viðmæli, sum Hartvig hevur skrivað er soljóðandi:

På given foranledning bekræftes herved, at snedker Niels Christoffer Debes, Tórshavn, Færøerne, blev antaget som lærling på mit maskinsnedkeri í 1936, og har han efter udstået læretid i 1941 arbejdet som snedker på mit værksted fra 1941 indtil slutningen af 1947 og derefter igen siden 1949.

Jeg skal herved give Niels Debes min bedste anbefaling som en god og dygtig snedker og kan anføre, at han ved den aflagte svendeprøve på Teknologisk Institut har fået tildelt bronzmedalje i erkendelse for godt udført arbejde.

Thorshavn, den 14. december 1959

Snedkermester Hartvig Hansen, maskinsnedkeri.

## Sveinastykkið

Sveinastykkið, sum Niels skuldi gera var nevnt: Fransk sykomode. Fyri sveinastykkið fekk hann bronsumedalju, sum vit síggja høgrumegin.

Tá vóru sveinastykkini sýnd fram alment, og millum tey, sum komu til hesa framsýning var Dronning Alexandrine. Hon beyð Niels 200,- kr. fyri sveinastykkið, sum hon hevði hug at keypa til ommudóttrina Margretu. Men Niels hevði ikki hug at selja henni sveinastykkið, hann svaraði henni kontant: „Det skal min mor have“. Ikki man Alexandrina hava grunað, at hon fór at fáa eitt slíkt svar.

## Frivillig mesterprøve

Sum viðurskiftini vóru um hetta mundi kundu lærlingar fara til Danmarkar, har teir kundu fara til tað, sum varð nevnt „Frivillig Mesterprøve“, sum í veruleikanum var ein próvtøka. Tá var ikki møguligt at fara til slíka próvtøku ella roynd í Føroyum.

Tí var Niels noyddur at fara av landinum um hann vildi hava eitt slíkt prógv. Niels er so farin við skipi til Keypmannahavnar, har hann var til próvtøku og fekk prógv dagfest 3. mai 1949.

Í hesum prógvi síggja vit hvørjar lærugreinirnar vóru og, hvussu hann stóð seg, men vit síggja ikki, hvat t.d. var hægst møguliga próvtal.

## Lærugreinir og próvtøl hjá Niels Debes:

| | |
|---|---|
| Materialelære: | 8 |
| Bogføring: | 9 |
| Kalulation: | 6 |
| Håndværkerret: | 4 |
| I alt: | 27 |
| Gennemsnidt: | 6,75 points |



*Kona Niels, Sigga (11.11.1920-21.10.2008), var úr Hvalvík, fødd Egholm. Niels (5-5-1920-29-6-2012) var úr Havn. Hann arbeiddi meginpartin av lívi sínum á snikkaraverkstaðnum hjá Hartvig Hansen.*



*Á eini síðu stendur: Flid og dygtighed fremmer velstand og lykke.*

*Og á hinari: Snedkerfagets svendeprøve kommision 24/4-1948 Niels Chrstoffer Debes.*




Vinnukundadeildin í Eik

## Tryggja tær arbeiðsfrið

Fá tíð til tað, sum hevur týdning fyri tína fyritøku, við góðari og skjótari ráðgeving.

Sverri er vinnukundaráðgevi í Eik.
Sum partur av byggivinnutoyminum hevur hann innlit í og áhuga fyri tørvinum og dagligdegnum hjá kundum sínum.
Vit arbeiða eftir meginregluni um, at góð ráðgeving og skjótar svartíðir tryggja, at tín tíð og tín orka verða brúktar til títt virksemi.

www.eik.fo tel. 348000



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Húsavarðartænastan

Brattalíð 8 | Tórshavn | hvt@hvt.fo | Tel. 29 00 29



Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðaruppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

## OGNA TÆR TÍN EGNA HÚSAVØRÐ

- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð







### Reinsa við turr-ísi



Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing. Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.

### Betong-saging



Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.







*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í sambandi við bygging, umbygging og viðlíkahald av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum...*

# ELIAS JOHANSEN

## SLEIPISTØÐ OG BYGGIHØLL Í ÁLAKERSVÍK

**Elias Johansen var sjálvlærdur og slóðbrótari, tá talan er um skipasmíð í Føroyum. Í 1905 bygdi hann sleipistøð og byggihøll í Álakersvík í Tórshavn. Tá mest var at gera hevði hann 25-30 dugnaligar og sjálvlærdir handverkarar í starvi. Tá bygdu teir - ikki minni enn - 12 størri og minni deksfør um árið.**
**Elias Johansen, vanliga nevndur Lias í Rættará, var føddur í Hvalvík 26. desember 1872. Fimtan ára gamal fór hann til Havnar at læra til skómakara. Hann stóð sveinaroynd og arbeiddi eina tíð sum skósmiður. Í 1898 fór hann undir sítt lívsverk; í fyrsta umfari at umvæla og smíða størri bátar á Lágukai við Rættará í Havn.**

Søgan um stóra virksemi hjá Lias í Rættará byrjar, tá hann saman við Niels í Dali fór at smíða sonevndar lossingarbátar niðanfyri húsini hjá Jampan úti í Rættará. Har høvdu teir eitt pakkhús hjá Muller til verkstað. Fyrsti lossingarbáturin teir smíðaðu var til handilsmannin Jens Petur Evensen í Havn. Hann var 8-10 tons stórur og var sagdur at vera góður siglari. Hann fekk navnið Dansarin. Soleiðis skrivar Niels Juul Arge m.a. í bókini: „Bankabókin. Sjóvinnubankin 50 ár (1983)".

Fyri at fáa sær størri kunnleika til skipatekning og kravelbygging fór hann á heysti 1901 til Porsgrunn Baadebyggeri í Norra. Har lærdi hann at tekna og smíða ymisk skipasløg. Um frálæruna hann fekk í Norra hevur hann m.a. skrivað soleiðis: „Den unge tegner ved Mekanisk Værksted, Olavus Larsen, lagde virkelig en stor flid for dagen ved så hurtigt at lære mig både at forstå og at arbejde efter tegning, og jeg må sige, at hans arbejde kronedes med held, og jeg fik det vidnesbyrd af han, at det gik over hans forventninger, at jeg på en så kort tid skulle kunne klare at udføre det arbejde. Men det var bevis på, at han var sit fag voksen, og igennem ham fik jeg mange ting tilhørende mit fag at vide, som jeg ellers ikke havde fået at vide af nogen anden".



*Elias Johansen. 26.12.1872 - 20.11.1925. Hann lærdi til skómakara, men motorbátasmíðið gjørdist lívsverk hansara*

### Fyrstu deksbátarnir

Fyrsta deksbátin smíðaði teir veturin 1900-1901 á Lágukai í Rættará. Hann var 38½ fót, og merktur 9 tons.

Hann hevði ikki motor, men mastur og segl. Eitt tíðarskeið átti Olaf Finsen apotekari í Havn bátin, seinni var hann heimahoyrandi á Tvøroyri, har hann var brúktur til lossing.

Seinni smíðaði teir deksfarið Eli til Restorffs Handil í Vágsbotni. Eli varð sjósettur av Høgukai 26. august 1901. Eli var 43,5 føtur langur og merktur til 17,41 tons. Árið eftir var hann tikin upp á sandin í Vágsbotni og fekk motor ísettan. Royndartúrin sigldi hann 8 míl. Eli var fyrsti deksbáturin, sum fekk motor ísettan í Føroyum.

Fyrstu deksførini vóru súðubygd, borðplankarnir lógu ikki sléttir sum á vanligum skipum, men umskaraðust eins og borðini á føroyskum róðrarbáti.

### Prøven og Gásadalsbáturin

Heimafturkomin úr Norra fer Lias undir at skipa fyri bygging av kravelbygdum báti. Veturin 1902-1903 smíðar hann seglskipið Prøven, ið var 24 tons. Hann er spískur í báðum endum. Prøven fekk motor ísettan í 1906 og róði út undir Íslandi í fleiri ár; árini 1903-1907 var Óli á Bø bátsformaður. Í 1909 keypir Olaf Finsen Prøven, sum fyri tað mesta lág fyri teym. Á sumri 1912 fer Jens í Dali til Danmarkar við Prøven, har hann var seldur 29. mars 1914.

Í 1905 letur Lias 15 tons stórt deksfar, sum verður nevnt Eva, úr hondum. Tað er Mikkjal Pauli Mikkelsen úr Gásadali, ið letur hana smíða. Eva, ið eisini varð nevnd Gásadalsbáturin, hevði runda hekku, eina mastur



*Farmaskipið Eli hjá vágsbotnhandlinum kemur á Havnina. Farið sigldi farmasigling millum handilin í Havn og úthandlar á bygd. Eli sigst eita eftir Eliasi og var fyrsta deksfar í Føroyum, sum fekk motor. Tað var í 1920.*



Lias í Rættará og Niels í Dali smíða helst fyrsta bátin undir húsunum hjá Jákupi Andriasi Arge (Jampman). Sethúsini hjá Liasi síggjast dygst norðan fyri Rættará.

og ein 10 hesta Dan motor. Árini 1905-1907 var Eva til útróður undir Íslandi. Á sumri 1908 var hesin bátur seldur til Seyðisfjarðar.

## Av Høgukai út í Álaker

Í 1905 letur Lias í Rættará sleipistøð, verkstað og høll byggja í Álakersvík. Í hesi høll var møguligt at smíða deksfør upp í 20 tons. Á donskum vóru hesir bátar nevndir „motorkutter". Seinni bygdi hann eina størri høll, og tá var møguligt at smíða skip upp í 45 tons.

Fyrsti motorbáturin, teir hjá Lias smíðaðu í Álakersvík er til Dánjal Paula Nysted við Norðskála. Hann fór úr bakkastokki í 1906. Hann fekk navnið Albatros, var sløk 17. tons, hevði tvær mastrar og runda hekku. Dánjal Pauli var við honum til fiskiskap undir Íslandi. Teir vóru 5 mans.

1914 keypti Absalon Jacobsen í Syðrugøtu Albatros og gav honum navnið Bjørn. Í 1966 seldi Absalon bátin til Íslands. Niels Nielsen í Heiðunum og Christian Petersen í Gásadali førdu bátin til Íslands; báðir havnarmenn.

Bróður Lias í Rættará, Georg Johansen, hjálpti honum fyrstu tíðina. Í 1908 lat Georg motorbátin Arken smíða hjá bróðrinum. Hann var 7 tons, hevði eina mastur og 8 hesta motor. Georg búsettist seinni í Haldórsvík og var í fleiri ár til fiskiskap undir Íslandi við Arken. Hann plagdi at fylgjast um hav við bátum, sum høvdu lærdan skipara umborð. Seinasta árið hann var til fiskiskap undir Íslandi var í 1915; hetta árið seldi hann bátin í Íslandi.

## Stórt arbeiðspláss

Skjótt gjørdist fyritøkan hjá Lias í Rættará millum stóru arbeiðsplássini í Havn. Tá mest var at gera fóru 12 motorbátar av bakkastokki um árið. Umframt at smíða nýggjar bátar var nógv umvælingararbeiði at gera umborð á sluppum, áðrenn tær fóru til fiskiskap um várið.

Lias í Rættará smíðaði eisini bátar og skip til íslendingar. Tann størsti var Bragi; hann var 45 tons, nærum líka stórur sum Norð-lýsið, sum í dag kann kallast ferðamannaskip. Íslendingar komu til Føroya eftir bátinum og sigldu hann sjálvir til Íslands. Tá ið mest var at gera arbeiddu einir 25-30 mans hjá Liasi.

## Kunoyarbáturin Nakkur

Í 1912 smíðaði Lias ein bát til Paula Heinesen í Kunoy, sum fekk navnið Nakkur. Hann var 6 tons, riggaður sum slupp, hevði eina mastur



Deksbátur fer á sjógvin hjá Liasi í Rættará úti í Álkersvík. Tá ið mest var at gera, flotaðu teir ein bát um mánaðin

og ein 7½ hesta Gideon motor. Ein útróðrartúr í tjúgunum steðgaði motorurin upp. Tað var illveður, og tá motorurin ikki fekst í gongd aftur, fór manningin umborð á ein annan bát, sum kom teimum til hjálpar. Nakrar dagar seinni kom Nakkur rekandi suður ígjøgnum Kalsoyarfjørð; tá eydnaðist at bjarga bátinum inn á Klaksvík.

Nú keypti Hermann Thorsteinson, sum var íslendingur, Nakk. Hann fekk Jákup Biskupsstøð at smíða Herman stýrhús á hann og fór sama várið á Eysturlandi at rógva út. Við honum vóru Baldvin, sonur hansara, og Niels Hjemsten úr Vági í Klaksvík. Ferðin gekk væl, teir høvdu 48 tímar á Seydisfjørðin. Nakkur kom ikki aftur til Føroya. Hermann Thorsteinson gjørdist ikki gamal maður. Hann andaðist í Klaksvík í 1936, 51 ára gamal.

## Lias var virkin maður

Umframt at smíða bátar og skip hevði Lias orku til at røkja onnur áhugamál. Í mong ár var hann býráðslimur, sat í meinigheits-ráðnum og var virkin avhaldsmaður.

Lias í Rættará bar orð fyri at vera góður leiðari og dugdi væl at leggja arbeiði til rættis. Hann var skilagóður, og ikki bangin fyri at siga frá síni støðu.

Lias í Rættará gjørdist ikki gamal maður, doyði 52 ára gamal 20. November 1925.

Tá ið Lias var farin, skrivaði fosturdóttir hansara Andrea Árting minningarorð um hann. Hon skrivaði m.a. Lias hevði lært skip-atekning og sjálvur funnið út tann smíðihátt, ið hóskaði best til okkara streymharða sjógv.

Skuldi hann so ikki hætta sær at fara í holt við eina slupp? Jú, víst – tá fyrst var hann komin á mál – og saman við soninum Jóhan, skipa- og bátabyggjara, gjørdi hann tekning og yvirslag yvir eina slupp upp á 120 tons. Og tann, ið kendi Lias í Rættará, veit, at hjá



Lias fekk sær bátaverkstað úti í Álakersvík í 1905. Verkstaðurin (húsini bæði vinstrumegin) er burtur, men tey trý neystini standa framvegis.



Verkstaðurin hjá Lias í Rættará. Sornhúsið hómast dygst omanfyri. Áður stóð spælið, ið togaði bátarnar niðan, millum húsini, men mátti flytast niðan um sornhúsið, tá ið høllin varð útbygd niðaneftir.

honum var ikki langt frá ætlan til gerð. Men deyðin kom, og Lias fekk ikki sín kongstanka útintan".

Sonurin Jóhan Johansen, seinni Meitilberg, tók við, tá ið faðirin var farin. Í teimum vánaligur tríatiárunum steðgar arbeiðið í Álakeri, og harvið virsemið, sum Lias í Rættará grundlegði í 1898. Annar sonur Lias Eliesar hevur greitt frá, at faðirin var við til at smíða 135 motorbátar.

## Verland Johansen skrivar

Verland Johansen, sonur Lias í Rættará, hevur skrivað um tíðina hann var smádrongur og hálvvaksin. Í einum brotið skrivar hann: „Pápi hevði verkstað og sleipistøð úti í Álakersvík. Har vóru nógvir menn í arbeiði, og okkum smádreingjum dámdi væl at vera har úti, fjasa við okkurt smátt og við hvørt gera okkurt til nyttu. Tá havi eg verið eini 6-7 ár. Teir smíðaðu motorbátar við dekki í, og tað var ikki smávegis, teir fingu frá hondini. Einir 25-30 mans arbeiddu har, tá ið tað var upp á tað mesta."

Hetta vóru útróðrarbátar, og við tað at teir vóru deksbátar, kundu teir vera til havs einar tveir dagar í senn. Teir høvdu lugar og kabúss, so væl bar til at kóka sær ein drekkamunn – og døgurða um so skuldi verið. Eisini bar til at fáa sær ein blund á beinkinum í lugarinum.

## 14 bátar av bakkastokki

Og Verland heldur fram: Olaf beiggi segði mær einaferð, at í einum ári fóru 14 bátar av bakkastokki. Kanska tveir hava verið næstan lidnir við ársbyrjan. Tað var soleiðis, at har vóru tvey stór hús at smíða bátarnar inni í, so væl bar til at arbeiða í øllum veðri og eisini seint bæði vetur og summar.

Ljós høvdu teir eisini. Tað kallaðist luxlampur. Frá einum stórum petroliumstanga gingu heilt kløn koparrør, sum vóru so long, at tey rukku inn í teir bátar, sum vóru innilokaðir, og annars runt á verkstaðnum. Tað einasta, sum var eitt sindur óheppið við hesum slagnum, var netið, sum gav ljósið. Hetta netið, ið var til støddar sum ein tjúkkur tummil, var ógvuliga veikt og brotnaði lætt, kom tað at onkrum. Men væl lýstu tey. Í 1921 kom el-ljósið, og tá var alt lættari. Arbeiðstíðin var 60 tímar um vikuna. Arbeitt varð frá sjey á morgni til sjey á kvøldi hvønn gerandisdag. Einki var, sum æt feria.

Seinni, tá ið eg var um 12 ára aldur, arbeiddi eg ofta har úti seinnapartin eftir at vera komin úr skúla. Tað kundi vera at saga brenni til dampketilin og at ansa eftir fýrinum. Eisini at bøta rivur í gomlum árabátum og tjøra teir.

## Menn kring allar Føroyar fingu sær motorbátar

Undir fyrra verðinskríggi og frammanundan vórðu nógvir motorbátar smíðaðir. Tá var nógvur útróður, og menn kring allar Føroyar fingu sær hesar bátar, sum vóru 8-14 tons. Fleiri vórðu gjørdir til Íslands, tann størsti var um 45 tons. Hann fekk navnið Bragi. Tá hann skuldi byggjast, noyddust teir at vaksa um tað størsta verkstaðið við o.u. 10-12 metrum.



*Stakkafossur TG 331 í Íslandi í 1922. Maðurin er Andrias Nolsøe, Andrias á Tanganum á Tvøroyri. Hann átti bátin, men seldi íslendingum hann í 1924. Lias í Rættará smíðaði Stakksáfoss í 1918.*

Áðrenn útbyggingina, var so gott pláss millum verkstaðið og sornhúsið, at spæli, ið togaði bátarnar upp á bedingina, stóð har, og tað kravdi nógv pláss.

Hetta var eitt sokallað gangspæl, Capstan. Tvey long spír vóru stungin á kross gjøgnum yvirpartin, so at fýra ella átta mans kundu ganga runt og runt, meðan hivað varð. Frá spælinum varð veirurin malin upp á eina trumlu. Spælið varð flutt niðan um sornhúsið, tá bygt var upp í verkstaðið, og trumlan kom at standa inni í sornhúsinum. Nú, vit skriva 1984, eru enn einir 12 bátar frá teirri tíðini í brúki.

## Ein hending

Og Verland Johansen heldur fram: Eg havi verið um 13 ára aldur og plagdi, sum áður sagt, at vera úti í Álakeri í feriu ella eftir skúlatíð at gera eitt sindur til nyttu. Henda dagin skuldu teir toga ein bát upp, og eg var settur at vinda veirin upp á trumluna, meðan



*Forkunnug mynd tikin av skálatrøð um 1904. Müllers pakkhús líkist sær sjálvum, og uttast høgrumegin, á Høgukai, smíðar Lias í Rættará motorbát. Vinstrumegin Müllers pakkhús, har ið Tórshavnar skipasmiðja varð grundað, smíðar Laurits í Mortansstovu helst fyrsta motorbátin Dan. Ytst vinstrumegin Konslarapakkhúsið.*

einir fýra ella seks mans gingu og mólu spælið.

Pápi ansaði eftir niðri á bedingini, og tá ið steðgast skuldi at hiva, blásti hann í eina floytu, tí ikki sást niðan. Alt gekk, sum tað skuldi, til einaferð tá ið veirurin kom fastur í spælið. Teir steðgaðu at hiva og lorðau eitt sindur, so eg fekk rykt hann leysan.

Pápi kemur niðan at vita, hvat var galið. Teir søgdu, hvussu vorðið var, og pápi gav mær eina ábreiðslu.

Eg segði, at eg kundi ikki gera við, at veirurin hevði kíla seg fastan. Hann bað meg tiga og passa mítt arbeiði. Tá ið vit vóru komnir heim til døgurða, segði hann við meg, ógvuliga álvarsamur, at tá ið hann segði nakað úti á verkstaðnum, so vildi hann ikki hoyra nakran muta ímóti. Soleiðis var hann. Úti á verkstaðnum vóru vit, synir hansara, ikki øðrvísi enn allir aðrir. Tað gav at bíta, einaferð eitt systkinabarn mítt arbeiddi har. Hann hevði fingið eina skortfleingju frá pápa um okkurt og segði: „Tygum eru ein deiligur pápabeiggi“. Og svarið, hann fekk, var: “Her úti eri eg eingin pápabeiggi!“.

Tá ið eg fór úr skúlanum, arbeiddi eg eina tíð úti í Álakeri. Ikki mundi tað vera stórvegis, men alt, sum ein drongur kundi gera. Ta tíðina smíðaðu teir nógvar føroyskar bátar, sum fóru til Íslands at rógva út. Tað vóru seksmannafør. Okkurt um átta ella tíggju vórðu send av stað í senn við einum norskum skipi, sum sigldi upp á Føroyar og Ísland.

## Bygdu fleiri motorbátar til Íslands

Undir fyrra krígnum, og árini aftaná vórðu fleiri motorbátar bygdir til Íslands. Teir vórðu latnir siglingarklárir, og vanliga sigldu íslendingar bátarnar yvir sjálvir. Tann seinasti skuldi tó førast við skipi. Tað var ein 12-14 tons bátur. Eg minnist, tá ið hann var skipaður út til skipið. Eg slapp við. Fast varð gjørt á hann, og so at hiva. Men ólukkutíð, ikki fekst hann inn um stokkin – bummurin var ov lágur. Teir royndu alt tað, teir kundu, men einki batti. Har var einki at gera. Báturin varð so lagdur fyri teym á Vestaru vág, og har mundi hann liggja tað mesta av einum ári – Christian í Dali keypti hann. Hetta var tann seinasta Louisa. Teir hjá Liasi smíðaðu tríggjar motorbátar, sum fingu navnið Louisa.



*Í 1912 var fyrsta Luisa á fiskivinnustevnu í Keypmannahavn. Farið liggur her í Skovshoved havn, og skiparin, Christian Christiansen, Loðsurin nevndur, stendur aftan fyri ruffið.*

## Tríggir deksbátar við navninum Louisa

Christian Christiansen, Christian í Dali í Havn, átti allar bátarnar, sum fingu navnið Louisa. Seinasta Louisa – hana, sum Verland Johansen nevnir – átti hann saman við soninum Sofus Dal Christiansen. Frágreiðing Ver landssamsvarar við ta, sum stendur í smíðiváttan byggimeistarans, ið nevnd var bilbræv: „Undertegnede erklærer herved paa Tro og Love, at jeg paa mit Værft, Elias Johansens Skibs og Baadebyggeri i Thorshavn i Aaret 1925 har bygget Motorkutter Louisa af Thorshavn til og for regning af: Hr. Kjøbman Steffan Jacobsen, Faskrudsfjord dog ikke fuldført, men solgt til Sofhus Dal Christiansen og Christian Christiansen begge af Thorshavn, og fuldført for deres Regning“.

## Fyrsta Louisa á fiskivinnustevnu

Fyrsta Louisa varð flotað í 1912; tá var ein gamal fyribils motorur settur í hana. Hon var 6,32 tons. Við farinum sigldu Loðsurin, sum Christian Christiansen varð róptur, hetta sama summarið til Keypmannahavn á fiskivinnustevnu. Við á ferðini vóru sonur hansara, Sofus Dal Christiansen, Jóhan Christiansen (Hanseman hjá Mikkjal), Jákup Hans Jacobsen hjá Kaldbaks Peturi og Harald Joensen (Haraldur innan fyri á úr Miðvági).

Steðga var í Keypmannahavn í 14 dagar, og síðan varð farið til Humlebæk at fáa nýggjan Gideon motor.

Heldur vánaligt veður var at sigla, serliga til Danmarkar, men teir komu heim aftur í øllum góðum um Ólavsøkuna hetta sama summarið.

Donsk bløð skrivaðu um henda sjálvsama bátin, sum komin var úr Føroyum á fiskivinnustevnu í Keypmannahavn.

Christian í Dali seldi Thomsen á Tvøroyri hesa Louisu, sum fekk navnið Ørn. Jákup á Hólum í Sandvík leigaði hana at rógva út við,



*Farmaskipið Eli liggur svínabundið úti fyri stabban í Vágsbotni. Stóra ferðamannaskipið á Havnini man hava havt høvuðsáhugan hendan dagin*

og seinni keyptu Dánjal á Hólum í Sandvík og synir hansara hana. Teir fiskaðu óføra væl, og onkran túrin vóru teir úti á Føroya Banka. Aftan á seinna kríggið riggaði Dánjal av, og eigaraviðurskiftini broyttust. Niclas Joensen í Sandvík keypti part í Ørnini, og seinni átti hann bátin einsamallur.

Í fimmtiárunum varð Ørnin seld Eliasi Jacobsen í Sørvági, og haðani fór hon til Klaksvíkar – til Karl Nielsen og Dánjal Jacobsen. Seinni keypti Karstin Hansen, Klaksvík, part og síðan allan bátin. Seinni seldi Karstin Hansen bátin til Hans Johansen, Hans hjá Talis í Havn, bátin. Seinasti eigarin var Eyðfinn Petersen í Havn. Sum skilst, stóð báturin uppi á landi í Signabø seinastu árini til hann var upphøgdur.

## Onnur og triðja Louisa

Onnur Louisa varð smíðað í 1916; hon var 10,76 tons. Hon hevði fleiri eigarar m.a. Kjølbro í Klaksvík.

Triðja Louisa fór úr bakkastokki í 1925. Hon var 13,36 tons og var millum seinastu før, sum bygd vóru hjá Lias í Rættará. Triðja Louisa hevði nógvar eigarar. Í 2000 var hon skrásett á Tvøroyri við navninum Tindur, og fór úr skrásetingini í 2002.

gimmix.fo
– alskyns reklamulutir
Tel. 224692 & 211083




Linde Gas
AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Køligass

Upplatingartíðir :
mána, -fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo
www.gassola.fo

## HANS B. ARGE OG BÁTAMOTORURIN

# „ROYNDIN“

Hans B. Arge varð føddur 15. juni 1896. 18 ára gamal fór hann á nýstovnaða motorpassaraskeiðið í Havn. Aftan á lokið prógv flutti hann til Danmark og fór í maskinlæru á Orlogsverftinum í Keypmannahavn. Ein part av tíðini búði hann á lælingaheiminum, har eisini aðrir føroyingar, sum vóru í handverkslæru í Keypmannahavn, búðu. Í Keypmannahavn hitti Hans, Andreu Toftum úr Vági, sum hann seinni giftist við.

Í 1920 doyði faðirin, Petur Arge, og eftir hann stóð m.a. smiðjan úti í Grind. Hans hevði hug at føra smiðjuna víðari, men av tí at hann ikki var 25 ára gamal, var hann ikki myndugur eftir tágaldandi lóg. Tí mátti hann søkja amtið um ”Fuldmyndighedsbevilling”. Hetta fekk hann 18. september 1920.

Dreymurin hjá Hans var at byggja ein bátamotor til føroyska bátin, og helst hevur tað verið hetta, sum fekk hann til at seta upp eitt lítið metalstoyparí. Í smiðjuni var essa og á loftinum stóðu dreygubonkur og aðrar maskinur.

Formi- og stoypiteknikkin og konstruktiónstekning hevði hann lært í Keypmannahavn. Dreymurin gekk eisini út, tí nøkur ár eftir, at hann hevði sett seg niður úti í Grind, stóð tann fyrsti motorurin liðugur; hann varð kallaður Royndin. Hvussu nógvir motorar av hesum slagnum vóru gjørdir er óvist, men tað sigast, at tríggir eru varðveittir.

Framleiðslan av Royndini steðgaði m.a. tí hann ikki var kappingarførur í prísi. Stoypariíð virkaði tó væl í mong ár, og mong vóru tey skrúvubløðini – og aðrir maskinlutir – sum vóru framleidd hjá honum. Kortini kom ikki rættulig gongd á framleiðsluna, fyrr enn seinni heimsbardagi forðaði føringum at fáa eykalutir til skipsmotorar og –maskinur.

Hans fór tá fúsur undir at víðka um stoypariíð og maskinverkstaðin. Nógv nýggj tól vóru keypt úr Bretlandi. Dreyibeinkirnir gingu nátt sum dag til at snøgga tað til, sum stoypt varð, og ta tíð, tá mest var at gera, vóru tveir mans á verkstaðnum, sum einki annað gjørdu enn træmodell av tí, ið stoypast skuldi, og trý vaktarskifti av maskinmonnum. Tær neyðugu tekningarnar gjørdi Hans sjálvur.

Seint í 1940-árunum fór Hans Arge undir at konstruera ein rennistrong til kolarbeiði í Famjin. Hann var gjørdur við sjálvtømandi kurvum. Seinni gjørdi hann rennistreingir í sambandi við bátaspøl til bátadráttin á Trøllanesi, Mikladali, Kirkju og aðrastaðni, har høgt berg er at draga bátar og førning uppum.

Nógv vóru reiðaravirkini, sum høvdu smiðjuna hjá Hans til at væla um motorar og annað. Serliga nógv var at gera, áðrenn skipini fóru út um várið.

Nógvir vóru teir, ið stóðu í læru hjá honum og gjørdust maskinmenn og maskinmeistarar, talið man liggja millum 40 og 50.

Sum tíðin leið og fabriksgjørdir eykalutir aftur kundu fáast, minkaði hendan framleiðslan so við og við, og tá heilsan fór at bila, fór Hans burturav at gera føroyskar skreytlutir við innløgdum silvuri, eitt kynstur, hann lærdi av pápanum, og sum í sløkum tíðum var hent at tríva í. Eisini her liggur eftir hann ein stór framleiðsla.

Betri smiði enn Hans B. Arge við størri listarligum hegni skalt tú leita leingi eftir. Tað var eftirmælið, hann fekk, tá hann andaðist 10. mars 1963.



*Hans og systrarnar Dea, Bette og Lina*




*Einasti føroyski bátamotur „Royndin“, sum Hans framleiddi*

**Ídnaðar- og garaguhurðar**
**Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92**

**Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður**
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

## Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






**MEST**

MEST
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

**rør-tænastan**
v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80
*Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión*



aquatherm BAXI ROYAL SCANDINAVIAN VØLUND VARMETEKNIK

**DEMICH P/F**
Stiðjagøta 2
Postboks 378
110 Tórshavn
Tel 200 300
Fax 200 301
demich@demich.fo

# HVS-VEITARIN TIL VINNUNA



HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ

Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345

**Tí velja handverkarar Demich**

- Vit veita bestu ráðgevingina
- Vit umboða dygdarvørur
- Vit hava kappingarførar prísir
- Vit hava góða kundatænastu
- Vit hava døgntænastu
- Vit hava framkomnar blikksmiðju
  *(Har vit kunnu tilevna inndekningar upp til 3 m)*

**demich**
Hiti ▪ Ventilatión ▪ Sanitet

Okkara dygd – tín trygd!
www.demich.fo

www.grafikmaster.fo

betri.fo



VIÐGERÐARTRYGGING

# Slepp undan **bíðilistum**

FÁ VIÐGERÐ INNAN 10 ARBEIÐSDAGAR

## Viðgerðartrygging er trygging, sum tryggjar tær eina skjóta og góða viðgerð, um tú gerst sjúk/ur ella ert fyri vanlukku.

**Við hesi trygging verður tú effektivt og trygt leidd/ur gjøgnum sjúkravgerð, skurðviðgerð og eftirviðgerð.**

Mølholm Forsikring A/S tekur sær av at fáa tær eina tíð á privatsjúkrahúsi ella privatum viðgerðarstovni, sum hevur serkunnleika. Allar vanligar útreiðslur hjá góðkendum viðgerðarstovnum í Føroyum, Danmark, Skandinavia og Týsklandi eru umfataðar í hesi trygging. Tú kanst velja at víðka tryggingina til eisini at umfata flogferðaseðil millum Føroyar og Danmark aftur og fram.

**Vend tær til okkum á telefon 345700 ella betri@betri.fo og hoyr meira um okkara Viðgerðartrygging.**





TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón